gult cyan magenta svart





**NIFCA. Tað mest áhugaverda í arbeiðinum hjá Tummasi Jákup Thomsen beint nú er, at hann er sloppin at lána íbúð og atelier í Oslo, har sum Edvard Munch búði á í 23 ár, sigur Meinhard Jensen í hesi samrøðu og viðgerð av listini hjá »unga listamannin úr Gøtu«. Í Oslo eru 64 hús til listafólk at halda til og arbeiða í. Helst er Tummas fyrsti føroyingur at nýta henda møguleika, sum kom í lag gjøgnum NIFCA, sum er felagsskapur í Norðurlondum fyri nútímans list.**

# Ungi profeturin



*Meinhard Jensen við samansettari mynd av listamanninum Tummas Jákup Thomsen. Aftanfyri hómast konan Rutt*

*Mynd: Tórheðin Jensen*

SAMRØÐA
*Meinhard Jensen*

Inni í atelierinum hjá Tummas Jákupi Thomsen á Amager eru myndir, skulpturar og amboð og hundraðtals løgnir lutir. Har er loppumarknaður á hæddini niðriundir. Sumt er keypt har fyri næstan onki, og okkurt er funnið uttanfyri. Tummas Jákup stoytir á borðið úr einum posa. Tað sær út sum ein brotin koppur. Hann sigur, at tað er skelin av einum skeljadýrið. Hon hevur eitt einastandandi vakurt og innviklað mynstur, men er litfarin og í sorli. Hetta fekk hann í hondina ein dagin, hann var úti. Ein kvinna kom til hansara, sum hann ikki hevði sæð fyrr. »Eg veit væl, hvør tú ert, og at tú gert bíløt,« segði hon. »Tak hetta, hetta eri eg. Vita um tú ført sett meg saman aftur.« Tummas hevur ikki roynt at líma skelina saman, og tað er ikki vist, at tað ber til.

(Annars, typiskt Tummas at uppliva okkurt, sum eingin annar upplivir.)

## Ungi listamaðurin úr Gøtu

Tummas Jákup hevur ofta verið kallaður »ungi listamaðurin úr Gøtu,« men nú eru skjótt fimmogtjúgu ár síðan, hann hevði myndir við á framsýning fyrstu ferð. Hann var óteljandi ferðir við á Varmakeldu, Ólavsøku, Várframsýningini, Lions og sjálvur osfr., áðrenn hann flutti niður í 1995.

Síðan hann fór niður, hevur hann verið í Arken, Den Frie og Kunstnernes sommerudstilling fleiri ferðir, í Týsklandi, USA, Dragør osfr.

Tummas Jákup kom næstan beinanveg inn á Atelier 113 í Det Blå Pakhus, tá hann flutti niður í august 1995. Har heldur ein blandaður hópur av listafólki úr alskyns londum til. Helst hevur hetta latið upp fyri møguleikum. Tummas Jákup er við í eini Japanskari bók við altjóða list, sum hevur ligið opin í Louvre (har sum Mona Lisa hongur) í París. Hann hevur verið tríggjar ferðir í Kekkia og málað,og fekk legat til at fara til í Rom einaferð.

## Hjá Edvardi Munch í Oslo

Tað mest áhugaverda í arbeiði hansara fyri tíðina er, at hann slapp at lána eina íbúð og eitt atelier í Oslo á grundini, sum Edvard Munch búði á í 23 ár. Har eru 64 hús til listafólk at halda til og arbeiða í. Sum Tummas hevur skilt, so er hann fyrsti føroyingur at nýta henda møguleika. Tað kom í lag gjøgnum NIFCA, sum er felagsskapur í Norðurlondum fyri nútímans list (WWW.-NIFCA.ORG). Tað ber til hjá øllum at søkja, og tað er ikki bara í Oslo, tey hava atelier. Man kann eisini fara til Svalbard, eitt nú, sigur Tummas Jákup. Umsøknarblað fæst á NIFCA heimasíðuni.

Tummas letur væl at tíðini í Oslo. Hann hitti fólk, sá og teknaði nógv. Hann hevði eisini framsýning. Tá eg spurdi, um hann hevði sett seg inn í norska list, segði hann, at hann granskaði Edvard Munch, bæði í bókum og framsýningum. Hann búði jú í sama stað sum hann.

Edvard Munch, sigur Tummas, er tungvektarin í norðurlendskum høpi. Norðurlendski Picasso. Hann vísir mær nakrar myndir hjá Munch, men leggur mest dent á hendingar úr lívi hansara, og hvat menniskja hann var. Býráðið, sum sat í Oslo, tá Munch doyði, legði ikki so nógv í list, so teir rivu hús hansara niður fyri at gera parkeringspláss til fýra bilar! Men øll hini húsini á grundini hjá Munch standa enn. Hann hevði atelier, hús til tænastufólk og so framvegis. Her stongdi hann seg inni í mong ár og hevði sum minst við umheimin at gera. Ein dagin fór hann til gongu at vitja systur sína, sum eisini búði í Oslo. Tey høvdu ikki sæst í tíggju ár.

Tummas Jákup var eisini serliga hugtikin av Vigelands parkini í Oslo, har eitt ótal av standmyndum av fólkum eru. Gustav Vigelund stóð fyri standmyndunum, sum avmynda fólk í øllum aldri, og fyri tað mesta eru skulpturarnir í natúrligari stødd og størri. Serliga er tað ein standmynd, sum er einar tjúgu metrar høg, sum ímyndar ein hóp av fólkum, sum eru krøkt saman. Steinurin varð høgdur til í einum grótbroti og síðani fluttur við báti og á landi. Tað tók meiri enn eitt ár at flyta hann. Síðani skuldi hann høggjast til, og tað tók fleiri monnum fleiri ár. Ein søga sum henda sigur frá tí áhuganum, Tummas Jákup hevur í arbeiðsgongdini og arbeiðshættum, serliga tá tað er okkurt, sum brýtur frá tí vanliga.

## Hitti Anthony Gormley

Tummasi, haldi eg, dámar væl at síggja tað vanliga í »óvanlium« fólki og tað óvanliga í »vanligum« fólki. Hann var til fyrilestur hjá einum, sum hann valla hevði hoyrt um fyrr, men síðani fekk at vita, at hesin av mongum verður roknaður fyri ein hin størsta listamannin í okkara tíð. Hann eitur Anthony Gormley og er úr Onglandi. Ljósmyndatólið hjá Gormley riggaði ikki, sum tað skuldi, so Tummas fekk til uppgávu at tendra og sløkkja eitt ljós undir fyrilestrinum, og tað varð nógv flent at honum, tí hann var ofta ov skjótur at trýsta á kontaktina. Teir komu í prát aftaná, og Gormley segði fyri Tummasi, at hann hevði fingið 43 miljónir krónur frá einum ríkmanni í Onglandi, og tað var tí, hann fekk høvi at arbeiða so nógv við skulpturum, sum ofta eru úr dýrum tilfari.

Hesin Gormley tók einaferð mát av øllum fólkinum í eini bygd í norður Noregi. Síðani gjørdi hann so nógvar stabbar úr gróti, sum tað vóru fólk í bygdini, eftir mátunum, sum hann hevði tikið. Hesir standa nú í eini park í tí bygdini. Stuttligt var hjá honum at síggja fólki renna runt fyri at finna seg sjálvan. Eisini hetta er ein søga, sum Tummas kann fáa nógv burturúr, og hann er spentur, meðan hann sigur frá.

## Málningar og tekningar

Tummas Jákup reksar upp okkurt av tí, sum hann hevur fingist við listarliga gjøgnum árini. Í áttati og tíðliga í nítiárunum málaði hann fyri tað mesta. Seinnu helvt av áttatiárunum og nakað inn í nítiárini hevði stílurin útviklað seg væl, og tað var serliga eyðkent av sterkum litum og plastikkmáling.

Hann hevur altíð teknað, men tekningin vant upp á seg fyri eini tíggju árum síðan, og síðan hann fór niður, hevur hann gjørt lítið við at mála. Tað hevur verið blýantur og so eitt sindur av svartari olju.

»Vrakaðar myndir« vóru eitt ser-tummaskt fyribrigdi. Hann byrjað eitt sindur áðrenn hann flutti niður í 1995 at skava í fotomyndir og oyðleggja tær við klorini og skola tær í vatni. Síðani teknaði hann við penni og málaði á tær. Ein kollaga við 2016 tílíkum varð sýnd fram í Arken fyri fimm árum síðan. Tá hann fór undir at arbeiða við hesum myndunum, var hann hugtikin av forholdinum millum fotomyndina og veruleikan. Ein genta skrivaði einaferð stíl í studentaskúlanum um eina »vrakaða mynd,« sum var kopierað upp til A4 stødd, og lærarinnan segði við næmingin, at hon kundi biðja Tummas kontakta seg, og so skuldi hon læra hann eitt sindur um málningatøkni.

Tummas sigur, at hann hevur gjørt nakrar myndir í seinastuni, sum hava verið ein blandingur av tekning og málningi. Litirnir eru fyri tað mesta reytt, blátt og grønt afturat blýanti og svartari olju. Tá hann fer at sýna fram einsamallur í Listaskálanum komandi heyst, verður tað helst við hesum slagnum av myndum.

Hesi árini, hann hevur teknað, hevur hann tó málað nakrar myndir. Ein er av einum hvíttklæddum manni, sum gongur niðan á eitt fjall. Hon ber dám av bíbilskum søgum og hongur í føroysku kirkjuni á Amager, sum Tummas Jákup gongur í. Ein onnur er eitt klassiskt føroyskt bygdamotiv við einum lítlum fráviki. Tað er ein mynd av Skipanesi, men á fjørðinum liggur heimsins størsti oljuboripallur bundin við bryggju.

## Installatiónir

Ein grein innan myndlist, sum hevur vundið nógv upp á seg seinastu árini, er installatiónin, ella uppseting. Tað eru ikki nógvir føroyingar, sum hava fingist við tað, men Tummas Jákup hevur roynt seg við tí av og á. Ein málaður bilur kann teljast sum installatión, og tað hevur hann roynt tvær ferðir. Fyrru ferð var tað ein gamal, bláur Opel Kadett, sum hann málaði appelsingular prikkar á. Íblásturin kom frá sorgarleikinum í Waco, Texas. Einaferð, sigur Tummas, runnu børn aftan á honum og róptu, ”Klovnabilur, klovnabilur.” Ein systurdóttir, sum tá var smágenta, kom inn í garaguna hjá teimum í Gøtu og segði, at ”Øll flenna eftir tær, men ikki Jesus. Hann heldur við tær.”

Annað dømi um installatión vóru seks lok til súltutoykrukkur, sum komu við á KS eitt árið. Lokini vóru hvít við reyðum puntum prentaðum á. Prentið skal líkjast toyi, sum fyrr varð nýtt at spenna yvir krukkur. Tummas Jákup málaði nakrar puntar reyðar og gav lokinum heitið ”Jeg elsker marmelade.” Hann hugleiðir um, at tað hevur nakað við popplist at gera. Andy Warhol málaði Coca Cola fløskur og Campbell's suppudósir. Súltutoy er ommuligt, men tað er eisini poppur og kitch, tí toyið er ikki toy, men prent, sum líkist toyi. Heitið ”Jeg elsker marmelade” talar eisini.

Tummas sigur, at hann hugsaði um, hvat hann ta ferðina skuldi gera fyri at fáa verkini gjøgnum nálareygað hjá KS sensurnevndini. Hann ivaðist ikki í, at tey fóru at góðtaka hesi lokini, helst fram um onkrar tekningar, hann eisini kundi sent. Hetta sigur eitt sindur um følingina, Tummas hevur við tíðarandanum innan list, og tíðarandanum sum heild. Annars heldur hann heldur hánt um tíðaranda, og hann heldur ikki, at hesi súltutoylokini skulu takast í serliga stórum álvara.

Puntarnir ganga aftur í passmyndini, har hann situr í fýra ymiskum skjúrtum. Hann tók myndirnar á høvuðsjarnbreytarstøðini í Keypmannahavn. Har kom fólk at hyggja at honum, meðan hann hongdi bakgrundina við grønu puntunum upp, og meðan hann kom út at skifta skjúrtu millum myndirnar. Referansan er aftur Andy Warhol við hesi endurtøkuni av sama andlitinum við lítlum frávikum í liti og uppseting. Marilyn Monroe myndirnar eru serliga kendar. Puntarnir eru ommuligir, men arbeiðsskjúrturnar eru eitt annað slag av kitch og poppi. Eitt ovurhonds stórt kopi av hesi myndini var við á eini Ólavsøkuframsýning.

## Landsløg

Tá tú hevur sagt, at Tummas Jákup ger landsløg, hevur tú ikki sagt so nógv. Men rætt er, at har er sum oftast hav ella oyðimørk, næstan altíð fjøll, og so eru luftin ella jørðin ofta okkurt, sum líkist rørum ella røðunum í eini veltu. Foyrur kallar hann tað. Hetta hevur verið lagið í næstan tíggju ár. Eg spurdi hann, hvat tað var við hesum fjøllunum. Um tey hava nakað við tað føroyska at gera. Tiltikni Toyotabilurin, sum bæði hevur verið í listaskálanum og Arken æt jú Útlandslag (Land Escape á enskum), og tað var einar Føroyar við snøggum, óslitnum fjøllum og ongum fólki. Har var ein grind, men eingin at drepa hana. Hann koyrdi við honum bæði í Føroyum og Keypmannahavn. Men Tummas sigur, at tað er ikki bara tað føroyska í fjøllunum. Fjøllini, sigur hann, eru ímyndin av tí fasta og tí savnandi. Tað er so nógv spjaðing og so nógvur skilnaður í heiminum, og tað er so nógv, sum dettur sundur. Men fjøllini standa og fara ongan veg. Tó, spjaðingin stendur við. Hann sigur henda kryptiska setningin, at menniskjuni savnast um fjøllini, áðrenn tey skiljast aftur. Fjøllini kunnu eisini síggjast sum ein mynd av Bábelstorninum.

Eg havi fyrr hoyrt Tummas Jákup tosa um fjøllini, at eisini tey detta sundur. Í yrkingini Grønt grót skrivar hann um fjøllini, sum brýnast og gerast sandur, og ísfjøllini, sum bráðna og gerast vatn. Tá ein alda brýtur og sandurin drekkur sjógvin í seg, kann tað vera eitt fjall, sum søkkur inn í eitt annað.

## Viðmerkingar til tíðina

Nógv av tí, sum Tummas hevur gjørt, er beinleiðis viðmerking til tað, sum er frammi í tíðini, so sum olju, kreppu, fartelefonir, Kursk osfr.

Men tað, sum verðin sær sum tíðindi og bara nemur við á yvirflatuni, steðgar Tummas við. Nógvar dagar aftan á, at verðin er givin at hugsa um Kursk, droymir Tummas dreymar um manningina. Tekningin Kursk frá 2000 er torgreidd, men tá Tummas tosar um hana, letur hon seg upp, og tekningin leggur honum vekt í orðini. Í fyrsta lagi sær hon lagnuna aftanfyri tíðindini. Men hon sær eisini einsemið í vónleysa deyðanum. Har er ein trolari á myndini, sum sigur okkum, at havið eisini er tað havið, sum føroyingar hava livað av og eru druknaðir í. Har eru fjøll og aldur, sum líkjast fjøllum og siga, at havið er eisini tað, sum altíð er. Hondin, sum kemur upp úr havinum, er hondin hjá tí, sum druknar. Men hon er eisini hondin, sum bjargar. Hyggur tú at henni, sigur Tummas, so minnir hon um mátan, teir ofta hava fingrarnar í religiøsum málningum.

Tá kreppan var við at bróta út, gjørdi Tummas eina mynd, sum æt Gullkálvadansur. Har var ein gullkálvur, og tvey fólk vóru hjá honum. Annað dansaði, meðan hitt hvíldi seg. Hetta var tíðliga í nítiárunum, tá Tummas ofta málaði myndir, sum fóru beint í andlitið, nakað sum grunge-tónleikur. Boðskapurin var greiður: summi hava mist trúnna upp á ríkidømi nú í ringu tíðunum, men tað verður bara ein løta, áðrenn stóra kapitalistiska vekingin kemur. Myndin Aftan á tað stóra ævintýrið er inni á tí sama. Hon er ein myndarligur spádómur um, at einaferð fara fólk at gera rannsóknir úr øðrum londum til Føroya fyri at kanna eina avtoftaða sivilisatión aftaná eitt oljuævintýr.

Tummas veit ikki, hvat verður næst. Hann sigur, at tað liggur ein rúgva av málningum úti í oyðimørkini. Tað ræður bara um at fara eftir teimum. Kanska vilja vit bara vera hjá fjøllunum. Hvussu er og ikki: Fá hava dugað sum Tummas Jákup Thomsen at finna sítt egna.

…

Og so ein góð at enda, sum er typisk Tummas Jákup: Gongutúrurin frá atelierinum við niðara enda á Holmbladsgade til Øresundskollegiið tekur einar tjúgu minuttir. Vit høvdu ein pakka við tekningum, sum eg skuldi taka við flogfarinum til Føroyar fyri hann. Prátið á vegnum snúði seg um, hvat eg skuldi siga, um tollarin spurdi, hvat var í. Ein var, ”Viss tollarin spyr, hvat er í pakkanum, skal tú siga, ”Øll vita tað, uttan tú!””

Myndir hjá Tummas Jákupi hanga í Listasavni Føroya, og Tøting í Gøtu hevur okkurt hangandi. Hann er við á Várframsýningini og verður møguliga við Ólavsøkuframsýningini. Komandi heyst hevur hann Listaskálan fyri seg sjálvan nakrar vikur. Tað ber eisini til at støkka inn á gólvið í Atelier 113. Tað er ikki so langt frá Øresundskollegiinum. Ansa tær um kvøldið, tí Holmbladsgade er ikki nøkur hugnalig gøta.

Eigur tú ein gamlan Sosial, finnur tú kanska onkran part av teknirøðini Bina og Bobo hjá Tummas Jákupi, sum Petur Jensen gjørdi tekst til.



*»Kursk« blýantstekning sum Tummas Jákup Thomsen teknaði í fjør*